# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Vit halda eitt vakið eyga við, hvat hendir í Myanmar, og hvat tað harðrenda stýrið har ger (Condoleezza Rice).*

# Foreldrini skuldu trýstast til at viðganga morð

**Portugisiska løgreglan ætlaði at fáa Gerry og Kate McCann at viðganga, at tey høvdu beint fyri Madeleine.**



Olegario Sousa, løgregluovasti, fekk til uppgávu at finna Madeleine McCann livandi ella deyða. Nú er hann frarin frá sum løgregluovasti, og í einari samrøðu greiðir hann frá, hví hann valdi at siga starvið frá sær.

-Vit lótu ymsar upplýsingar leka út, og endamálið við tí var at trýsta foreldrini til at viðganga, at tey høvdu beint fyri Madeleine og fjalt líkið, skal Olegario Sousa hava sagt sambært bretska blaðnum The Times. Sjálvur var hann ikki nøgdur við próvtilfarið, sum portugisiska løgreglan hevði, tí tað var alt ov veikt til at fara í rættin við.

Ein ónevndur portugiskur løgreglumaður hevur sambært NTB sagt, at tá løgreglan noyddist at ásanna, at hon kundi ikki loysa gátuna, royndi hon at fáa umheimin at venda sær ímóti Gerry og Kate McCann. Eitt kom fram, at Kate McCann kundi hava mist tolið við Madeleine og hevði doyvt hana við sovitablettum.

The Times veit eisini at siga, at foreldrini hjá Madeleine hava satt privatar agentar at leita eftir gentuni, tí tey halda ikki, at portugisiska løgreglan ger nóg mikið fyri at finna gentuna. Sambært blaðnum hevði Gerry McCann samband við teir privatu agentarnar longu tríggjar vikur eftir, at Madeleine var horvin, men hann noyddist at avsanna hetta, tí portugisisk lóg góðtekur ikki privatar agentar í slíkum málum.

*Tað var portugisiska løgreglan, sum kom við ábendingum um, at Kate McCann kundi hava givið Madeleine ov nógvar sovitablettir*

# Munkarnir hótta hernaðarstýrið

**Buddhistisku munkarnir í Myanmar leggja nú stórt trýst á hernaðarstýrið**

Umleið 30.000 fólk gingu í morgun kravgongu í høvuðsstaðnum í Myanmar, Yangon, har tey kravdu, at tað harðrenda hernaðarstýrið skal leggja frá sær.

Fremstir í kravgonguni gingu fleiri hundrað buddhistiskir munkar. Síðani í síðstu viku hava teir gingið kravgongu í Yangon, og uttan at siga eitt orð hava teir lagt stórt trýst á hernaðarstýrið, sum teir vilja hava frá.

Í gjár valdu munkarnir at fara til húsini hjá andstøðuleiðaranum, Aung San Suu Kyi, sum hernaðarstýrið setti í húsavarðhald. Í 1990 vann flokkur hennara tjóðartingsvalið, men hernaðarstýrið ógildaði valið beinanvegin.

Politiskir eygleiðarar í Asia siga, at mótmælini hjá teimum buddhistisku munkunum koma hernaðarstýrinum sera illa við, og endin kann gerast, at generalarnir noyðast frá. Munkarnir eru høgt í metum ímillum fólk, og spurningurin er, hvussu leingi teir vanligu hermenninir megna at standa ímóti trýstinum.



*Teir buddhistisku munkarnir eru størsta hóttanin higartil ímóti hernaðastýrinum í Myanmar*

## STUTT SAGT

### Fujimori latin Peru

Alberto Fujimori, sum er skuldsettur fyri svik og mannarættindabrot ta tíðina, hann var forseti í Peru, kemur nú loksins fyri rættin. Tey bæði seinastu árini hevur hann verið í Kili, men um vikuskiftið gjørdi myndugleikarnir har av at senda hann til Peru eftir áheitan fyri peruanskustjórnini. Alberto Fujimori var forseti í Peru frá 1990 til 2000, tá hann noyddist at flýggja av landinum. Frá 2000 til 2005 búði hann í Japan, men í 2005 valdi hann at fara til Kili. Har bleiv hann settur í húsavarðhald, og leygardagin bleiv hann koyrdur umborð á eitt flogfar og fluttur til Peru.

### Næstan heimsmet í skatti

Í fleiri ár hava sviar havt tann ivasama heiðurin at hava heimsins hægsta skattatrýst, men við verandi gongd fer Danmark avstað við tí heitinum um stutta tíð, skrivar Børsen. Tað svenska skattatrýstið er fallið í seinastuni, so tað nú er komið niður í 48,0 prosent og nærkast sostatt tí danska, sum er 47,7 prosent. Bæði sviar og danir fáa skattalætta næsta ár, men tann svenski lættin er størri enn tann danski, og tískil minkar munurin á skattatrýstinum uppaftur meiri næsta ár, skrivar Børsen.

### Høvundar mæla til frið

Fleiri av teimum fremstu rithøvundunum í Ísrael mæltu í gjár stjórnini til at samráðast við tann víðgongda palestinska felagsskapin Hamas við tí fyri eyga at fáa eina vápnahvíld í lag. Millum teirra, sum hava skrivað undir áheitanina, eru altjóða viðurkendir høvundar sum Amos Oz og David Grossman.